# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# World Cup-silvur til Pál



*Upplivingin at svimja undir liðini á OL-vinnaranum má bíða. Men eitt silvurmerkið í World Cup kapping er nú heldur ikki ringasta upplivingin, sum Pál Joensen hevur havt*

**Favroitturin gav avboð, og tí stóð dysturin um gullið millum Pál Joensen og Mads Glæsner**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Pál svam ikki undir liðini av tunesiska OL-vinnaranum, Oussama Mellouli, tá hesin gav avboð við skaða í økslini.

Tí gjørdist finalan á World-Cup stevnuni í Stockholm ein dystur millum Pál Joensen, Mads Glæsner úr Danmark og Robert Margalis úr USA.

Á pappírinum var talan um hampuliga javna kapping millum hesar, men í hylinum gjørdist munurin kortini so hampuliga stórur yvir teir 1.500 metrarnar. Rættiliga tíðliga í kappingini stóð greitt, at Margalis ikki megnaði at fylgja við, og so gjørdist talan um reint norðurlendska uppgerð millum Joensen og Glæsner.

Og hesa kappsvimjingina vann danin. Um teir 600 metrarnar skræddi Glæsner seg leysan, og munin, sum tá ikom, megnaði Pál ongan tíð at svimja. Seinastu umførini tóktist føroyingurin í meira ella minni at »doyggja« í vatninum, men við 14.48,89 gjørdist talan kortini um enn eitt føroyskt met hjá Pál. Og tað rakk so væl og virðiliga til silvurmerkið, tí ikki færri enn 25 sekund vóru aftur til Daniel Fogg úr Bretlandi, sum heldur óvæntað legði Robert Margalis aftur um seg.

## FAKTA

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Mads Glæsner | (Danmark) | 14:38.87 |
| 2 | Pál Joensen | (Føroyar) | 14:48.89 |
| 3 | Daniel Fogg | (Bretland) | 15:13.70 |
| 4 | Robert Margalis | (USA) | 15:26.21 |
| 5 | Viktor Bromer | (Danmark) | 15:31.18 |
| 6 | Jesper Svensson | (Svøríki) | 16:12.67 |

# AB flytur ikki upp

**Yvirkærunevndin hjá FSF hevur tikið avgerð um, at hvørki AB ella Skála skulu hava stig fyri dyst sínamillum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nakrar vikur eftir kappingarlok er nú gjørt av, at tað verður MB og ikki AB, sum saman við Fram flytur upp úr 2. í 1. deild.

AB hevur havt hendan sessin, eftir at felagið í fyrsta umfari vann kærumál móti Skála, sum teir mettu hava nýtt ikki-lógligan spælara.

Skála kærdi tó málið, og vísti millum annað á, at eisini AB spældi við ikki-skrásettum spælara.

Yvirkærunevndin hevur nú viðgjørt málið, og har er niðurstøðan, at tá bæði feløgini hava nýtt ikki-skrásettan spælara, skal hvørgin parturin hava stig fyri dystin, sum annars endaði 2-2 á vøllinum.

Tað ber við sær, at AB missur stigini, sum teir annars høvdu vunnið í úrskurðinum frá Aganevndini, og tí verður tað nú MB, sum flytur upp í 1. deild.

Endaliga støðan í 2. deild er sostatt, at Fram vinnur deildina við 45 stigum. MB er nummar tvey við 29 stigum, og AB er altso nummar trý við 28 stigum.

## Sætta pláss til Elspu

Elspa Mørkøre svam ikki sína bestu tíð, tá hon kom á mál við tíðini 0.59,81 á 100 metra frí. Hetta er 27/100 sekund verri enn tilmeldingartíðin hjá Elspu, men kortini var hetta nóg mikið til eitt sætta pláss í Stockholm. Eins og hjá Pál Joensen, so er venjingin tó ikki løgd eftir at toppa júst nú, men er kappingin fyrst og fremst liður í fyrireikingunum til EM, sum verður í Kroatia í desember mánaði.

**-mørk**

## Maradona hóttir við at gevast

Eftir bara tvær vikur í landsliðsvenjarasessinum í Argentina hóttir Diego Maradona longu við at gevast í sessinum.

Orsøkin til hetta er, at Maradona sjálvur vil gera av, hvør hjálparmaður hansara skal vera. Her vil argentinska legendan hava fyrrverandi liðfelagan á argentinska landsliðnum, Oscar Ruggeri, at hjálpa sær, men tað er leiðslan í fótbóltssambandinum alt annað enn fegin um.

- Eg orki ikki fyri Ruggeri. Hetta er nakað persónligt okkara millum, sigur argentinski fótbóltsforsetin, Julio Grondona.

**-mørk**

## Nordvest í hálvfinaluni

Talan var um sanna sensatión í donsku steypakappingini í gjár, tá Nordvest FC úr danmarkarseriuni tók ímóti AC Horsens úr superliguni. Púra óvæntað vann FC Nordvest nevnliga 2-1.

Fazil Keskin - sum hevði fingið eitt mál kolldømt tíðliga í dystinum - legði Nordvest FC á odda, tá ein hálvur tími varð spældur. Í seinna hálvleiki hevði Horsens eitt ræðuligt trýst á Nordvest-málið, men bólturin vildi ikki inn. Eftir 87 minuttum skoraði Fead Rama til 2-0 eftir kontra-álop, og so munaði lítið, at Gilberto Macena minkaði um munin í seinastu minuttunum.

Hetta er fyrstu ferð í 17 ár, at eitt lið úr Danmarksseriuni - sum er fjórðbesta deildin í Danmark - er í hálvfinaluni í donsku steypakappingini.

**-heris**